Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um útgjald til sjálvstøðugt vinnurekandi úr Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, settur landsstýrismanninum við umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar møguleikar hava sjálvstøðugt vinnurekandi og stjórar í egnari fyritøku at gerast fevnd av Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at kunningin viðvíkjandi tryggingarmøguleikum hjá sjálvstøðugt vinnurekandi er nóg góð?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakrar broytingar í mun til rættin hjá sjálvstøðugt vinnurekandi til at fáa útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, til tess at tryggja, at eingin dettur niðurímillum?

Viðmerkingar:
Samfelagið hevur stóran tørv á íverksetarum og fólki, sum tora at fara undir nýtt vinnuligt virksemi. Og tað hevur týdning, at hesi kenna seg trygg, um okkurt óvæntað stingur seg upp.

Ein sjálvstøðugur vinnurekandi hevur møguleika til at fáa løn sína útgoldna sum A-inntøku og soleiðis rinda inn í skipanirnar bæði sum arbeiðsgevari og arbeiðstakari, ella viðkomandi kann velja at fáa lønina útgoldna sum B-inntøku. Um so er, at tann sjálvstøðugi fær lønina útgoldna sum B-inntøku, hevur hon/hann ikki rætt til útgjald; heldur ikki, um viðkomandi sum arbeiðsgevari rindar ALS-gjald av lønini hjá fólki, sum hon/hann hevur í starvi. Men sum sjálvstøðugt vinnurekandi ber til at tekna eina arbeiðsloysistrygging fyri kr. 3000 um árið og eina barsilstrygging fyri kr. 500 um árið, um ein annars lýkur nakrar treytir. Men tað hoyrist aftur og aftur um sjálvstøðug vinnurekandi, sum detta niðurímillum, annaðhvørt tí tey ikki lúka treytirnar, ella tí at tey ikki hava verið vitandi um tryggingarmøguleikarnar.

Spurningurin er, um tað er tørvur á betri upplýsing, ella um tað er neyðugt at gera broytingar í hesum skipanunum, so at øll verða fevnd. Ein sjálvstøðugt vinnurekandi hevur eins og øll onnur tørv á einum trygdarneti, tá tað gongur ímóti, ella viðkomandi verður við barn. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 4. mars 2021

Aksel V. Johannesen